UTTAN ÚR HEIMI

# Lívshættisligt plutonium horvið í USA

**Tað horvna tilfarið er nóg mikið til at gera fleiri kjarnorkubumbur burturúr.**

USA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Skjalakanningar hjá amerikonsku myndugleikunum vísa, at stórar nøgdir av evninum plutonium eru horvnar, skrivar blaðið San Fransisco Chronicle.

Sambært blaðnum eru minst 270 kilo av plutonium horvin av einari rannsóknarstovu á kjarnorkustøðini Los Alamos National Laboratory í statinum New Mexico. Talan er um plutonium, sum er klárt at brúka til kjarnorkubumbur, og tey, sum hava kannað skjølini, siga, at talan kann vera um munandi størri nøgdir.

The Institute of Energy and Environmental Research, sum hevur kannað skjølini í Los Alamos, skal hava boðað stjórnini í Washington frá, at tað er ikki vist, at evnið er stolið, men at tað er ikki óhugsandi. Men aðrir møguleikar eru eisini. Ein er, at evnið er koyrt burtur, uttan at tað er fráboðað, og ein annar møguleiki er, at tað er goymt onkunstaðni, uttan at tað stendur nakrastaðni.

Arjun Makhijani, sum hevur verið við til at kanna skjølini í Los Alamos, sigur við San Fransisco Chronicle, at er evnið ikki á støðini í New Mexico longur, er tað eitt sera álvarssamt mál.

# Meðan forsetin heldur røðu



*Tað vóru ikki allir áhoyrararnir, sum vóru líka spentir, tá George W. Bush, forseti, fyrradagin greiddi næmingunum á herflotaskúlanum í Annapolis frá krígnum í Irak. Bush segði, at USA fer ikki úr Irak, fyrr enn uppgávan er fullførd, men eftir myndini at døma vóru tað minni enn so allir, sum hoyrdu, hvat hann segði.*

# Iraksk bløð fáa pengar fyri at bera góð tíðindi

**Í loyndum hevur amerikanska hervaldið í Irak rindað irakskum bløðum samsýning aftur fyri at bera góð tíðindi um gongdina í landinum**

IRAK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Endamálið er at geva irakum eina fatan av, at tað gongur tann rætta vegin, og at tað er amerikanarunum fyri at takka, skrivar Los Angeles Times.

Frá amerikonskum heryvirmonnum, irakskum tíðindamonnum og loyniligum skjølum hevur blaðið fingið at vita, at ein serlig fregnartænastudeild hjá amerikanska herinum hevur keypt eitt irakskt blað og eina útvarpsstøð, sum fáa pening aftur fyri at bera góð tíðindi um gongdina í landinum og fyri at rósa USA og teimum amerikonsku hermonnunum í Irak.

Talsmaðurin hjá verjumálaráðnum Pentagon, Bryan Whitman, sigur við Los Angeles Times, at hann kann hvørki vátta ella avsanna tíðindini hjá blaðnum. Hann leggur afturat, at hann hevur biðið herleiðsluna í Bagdad um fleiri upplýsingar um málið.

## Nú vilja teir samráðast

Tann sera illa lýddi uppreistrarfelagsskapurin Harrans Mótstøðuherur í Uganda sigur seg nú vera til reiðar at samráðast við myndugleikarnar. Vicente Otti, sum er næstovasti í felagsskapinum, sigur við BBC, at teir eru sinnaðir at samráðast um eina friðaravtalu, sum skal fáa enda á tí meiri enn 20 ára langa borgarakrígnum har norðuri í Uganda.

Diplomatar halda, at Harrans Mótstøðuherur er í ferð við at tapa kríggið ímóti stjórnarherinum, og at tað er orsøkin til, at hann brádliga er sinnaður at tosa um frið. Ein talsmaður hjá stjórnini í Kampala sigur við BBC, at myndugleikarnir ivast í, at tilboðið er meint í fullum álvara, og harafturat hevur stjórnin ikki álit á, at uppreistrarfelagsskapurin fer at halda eina friðaravtalu, sigur hann.

Harrans Mótsatøðuherur er kendur fyri sína sera harðrendu framferð ímóti sivilfólkinum í bardagaøkinum. Hann hevur eisini verið fyri hvøssum atfinningum, tí hann hevur burturfdlutt børn og síðani brúkt tey sum hermenn.

## Bin Laden í bók

Amerikanski søgumaðurin Bruce Lawrence gevur nú út eina bók við ymsum, sum yvirgangsleiðarin Osama bin Laden hevur sagt. Í bókini eru 24 røður, sum bin Laden hevur hildið í sjónvarpinum al-Jazeera, samrøður, sum hann hevur havt við ymsar fjølmiðlar, umframt aðrir tekstir.

Bruce Lawrence, sum dagliga starvast á lærda háskúlanum í Durham, sigur við AP, at vónandi fer bókin av geva amerikanarum eina betri fatan av tí, sum bin Laden hevur sagt. Hann heldur, at nógvir amerikanarar hava ilt við at gera sær eina heildarmynd av yvirgangsleiðaranum, og at bókin vónandi kann hjálpa teimum við tí.

Undan atsóknini tann 11. september í 2001 var tað rættiliga lætt at fáa fatur á tí, sum bin Laden hevði sagt, men atsóknin gjørdi, at arabisk forløg steðgaðu øllum útgávum, sum høvdu við bin Laden at gera. Bruce Lawrence heldur tí, at tað er í tøkum tíma, at okkurt nýtt frá honum verður givið út.

## Atkvøða um Elizabeth

Myndugleikarnir í Barbados hava gjørt av at biðja fólkið taka støðu til, um landið framhaldandi skal hava bretsku drotningina sum ríkisleiðara.

Owen Arthur, forsætisráðharri, sigur, at fólkaatkvøða verður um at broyta grundlógina næsta ár, og stjórnin hevur mælt fólkinum til at atkvøða fyri at broyta grundlógina, so landið verður skipað sum lýðveldi við einum forseta heldur enn bretsku drotningini sum ovasta leiðara. Hann heldur tað vera burturvið, at ríkisleiðarin hjá Barbadosbúgvum skal sita í London.

Barbados fekk sjálvsstýri frá Bretlandi í 1966, men valdi at varðveita Elizabeth drotning sum ríkisleiðara, og síðani hevur hon havt ein generalguvernør sum sítt hægsta umboð á oynni. Nógv fólk í Barbados kenna seg tætt knýtt at Bretlandi, men tey seinnu árini hava alt fleiri tikið undir við kravinum um at loysa landið frá bretsku krúnuni.

## Skjaldbøka tvey høvd

Ein nýklakt skjaldbøka í miðamerikanska landinum Costa Rica hevur tvey høvd, og vísindafólk halda, at dálking er orsøkin.

Carlos Dewes hjá heimsnáttúrugrunninum WWF sigur, at hetta er fyrstu ferð, at tey hava funnið eitt dømi um, at dálking ella veðurlagsbroytingar hava ávirkað skjaldbøkur. Sjálvur heldur hann, at tað er tann veksandi hitin í sjónum og dálkandi evni hjá landbúnaðinum, sum eru orsøkin til, at tann lítla skjaldbøkan hevur tvey høvd. Tí hevur hann skotið upp, at vísindafólk skulu halda eyga við hesum skjaldbøkuslagnum fyri at vita, um hon er tann einasta.

Á hvørjum ári koma fleiri túsund skjaldbøkur inn á Ostional-strondina í Costa Rica at leggja egg.